# Ársfrágreiðing 2015

## *Felagið*

*Í nevndini í  Kommunala Arbeiðsgevarafelagnum sita:*

Heðin Mortensen, formaður, Kommunufelagið
Pauli Trónd Petersen, næstformaður, Kommunufelagið
Magnus Rasmussen, Kommunufelagið
André Fredriksberg Danielsen, Kommunufelagið
Bogi Bendtsen, SEV
Poul Andrias Joensen, IRF

*Á skrivstovuni starvast:*

Anita Fuglø, leiðari
Marin á Brúnni, fulltrúi



*Innihald*

1. Inngangur
2. Yvirtøkan av eldraøkinum
3. Samráðingar í 2015
4. Flokkingarspurningar
5. Normeringar á dagstovnaøkinum og førleikaviðbøtur
6. Skeið, evnisdagar og onnur tiltøk í 2015
7. Kunningarferð í Danmark og í Íslandi
8. Felags almenn lønarskipan
9. Visiónsarbeiðið í KAF
10. Loðsing
11. Heimasíða okkara
12. Nýggj skrivstovuhøli
13. At enda

# 1

**Góðu luttakarar,**
hjartaliga vælkomnir á ársfund okkara í Kommunala Arbeiðsgevarafelagnum. Í hesi ársfrágreiðing verður trivið í nøkur av teimum málum, sum vóru á breddanum í farna ári, eins og hugt verður fram á leið.

Sum heild kann sigast, at tað so sanniliga grør um gangandi fót, og at virkisøkið hjá kommununum og interkommunalu felagsskapunum gerst alt meira fjølbroytt. Hesin framburður kemur vónandi eisini til sjóndar í hesi ársfrágreiðing.

Við yvirtøkuni av øllum eldraøkinum fingu kommunurnar 785 nýggj starvsfólk í sína tænastu, og má hetta sigast at vera eitt rættiliga lop í mun til tey 181, sum starvaðust hjá okkum innan økið frammanundan.

Yvirtøkan av eldraøkinum varð fyrireikað sum best frammanundan, men hóast hetta hava mong ymisk ivamál valdað viðvíkjandi starvsfólka- og sáttmálaviðurskiftum, og sum tískil løgdu hald á nógva orku hjá okkum í 2015.

Dagliga arbeiðið hjá umsitingini er í stóran mun at vegleiða limirnar í málum, sum alla tíðina stinga seg upp, og har arbeiðsgevari og starvsfólk kanska ikki draga eina línu.

Men harafturat má felagið eisini alla tíðina hugsa frameftir og seta sær mál, sum svara teimum avbjóðingum, sum komandi árini fara at hava við sær. Hetta er hugsanin við tí visiónsarbeiði, sum felagið er í holt við, og sum verður umrøtt seinni í hesi frágreiðing.

Arbeiðsmarknaður broytist støðugt. Mangan hava stríðs-spurningarnir hópað seg upp og fylt so nógv, at tað hevur verið trupult at hugsa frameftir. Komandi árini fara at krevja av okkum, at vit skulu ígjøgnum umskipanir (les: nýskipanir), har almenni geirin, sum kommunurnar jú eru ein munandi partur av, er innrættaður so mikið skilagott, at vit kunnu fáa fleiri og betri tænastur, uttan at samlaðu lønarútreiðslurnar fara upp ígjøgnum loftið.

Okkara felag eigur tí at hava gjørt sær greitt, hvørjum avbjóðingum okkara starvsøki serliga stendur fyri komandi árini, og hvussu vit í mestan mun kunnu gera okkara starvsfólk til viðspælarar í teimum broytingum, ið vit neyðturviliga mugu fara ígjøgnum komandi árini.

# 2

***Yvirtøkan av eldraøkinum***

So skjótt sum eldraøkið var yvirtikið, var skipað fyri kunnandi fundi, har allir sáttmálapartar tóku lut. Á fundinum var støðan viðgjørd, og komið varð inn á, hvussu kommunurnar hugsaði sær at málsøkið skuldi skipast komandi árini.

Feløgini høvdu frammanundan fingið tilfar um, hvat lá í kortunum. Við fundinum ynskti felagið, at partarnir heilsaðu uppá hvønn annan, og har lagt varð upp til eitt prát um framtíðina. Eisini var endamálið at greiða nærri frá virkseminum hjá og Kommunufelagnum og Kommunala Arbeiðsgevarafelagnum sum heild.

Greitt var frá, at í fyrstu syftu skuldi arbeiðið halda fram sum higartil, eins og sáttmálarnir við landið fluttu yvir til KAF sum arbeiðsgevara.

Prátað var mest um ítøkiligu broytingarnar við nýggjum setanarskrivum og at sáttmálarnir skuldu vera óbroyttir fram til sáttmálasamráðingarnar í oktober 2015.

Í framhaldi av fundinum vóru serstakar avtalur undirskrivaðar við tey feløgini, sum ikki serligur sáttmáli

var gjørdur við frammanundan. Við hini feløgini var avtalað, at hildið verður fram sum higartil.

Eftirfylgjandi samráðingar við heilsurøktarar og –hjálparar hava víst, at tað var eitt gott hugskot at savna partarnar, áðrenn vit av álvara løgdu frá landi, har vit tryggjaðu okkum, at øll vóru við umborð, og at tey vóru kunnaði um, hvussu vit hugsaðu okkum at leggja túrin til rættis. Vit hava upplivað samráðingarnar soleiðis, at samskiftið hevur verið konstruktivt og tískil hevur tað verið lutfalsliga lætt at røkka einum máli.

Við yvirtøkuni av eldraøkinum skuldi støða eisini takast til ymsar flokkingar har. Leiðslubygnaðurin var broyttur, nýggir leiðarar vóru settir, ið skuldu lønast eftir ymsum sáttmálum.

Eisini verður dagliga arbeiðið nú fyri ein part saman-tvinnað, soleiðis at summi starvsfólk bæði hava arbeiðsuppgávur inni í einum stovni, og aðrar uppgávur hjá brúkarum í økinum. Sjónarmiðið hjá teimum, sum hava merkt hesar broytingar, hevur vanliga verið, at tey nú hava fingið eina økta ábyrgd, og ynskja tí eina hægri løn. Hin vegin hava vit víst á, at munur sum so ikki er á arbeiðinum inni á røktarheiminum og heima hjá fólki.

Tað eru tí bert tey, sum hava fingið *eitt størri ábyrgdarøki*, ið møguliga eiga at flyta upp í ein hægri lønarflokk.

# 3

***Samráðingarnar í 2015***

2015 varð ikki nakað heilt vanligt samráðingarár. Byrjanin av árinum fór við at fyrireika yvirtøkuna av starvsfólkum og sáttmálum á eldraøkinum, og vit gjørdu í kjalarvørrinum av yvirtøkuni fimm nýggjar avtalur fyri eldraøkið.

Tíðliga á vári fóru vit undir fyrireikingarnar til samráðingarnar, sum skuldu byrja sama heyst. Í hesum sambandi er vert at nevna, at fundur var við Fíggjarmálaráðið frammanundan, har roynt var at leggja eitt felags støði undir samráðingarnar.

Hóast samráðingarnar byrjaði seint, tí løgtingsvalið í summar kom upp í millum, so gjørdist samráðingargongdin lutfalsliga løtt og uttan teir stóru snávingarsteinarnar. Frá báðum síðum var lagt upp til eina semjusøkjandi kós, og tí var í fleiri førum rokkið á mál innan ársskiftið.

Fyrst var serstøk semja gjørd við Búskapar- og Løgfrøðingafelagið 11. november. Har varð avtalað, at starvsfólkini, ið koma undir sáttmálaøkið hjá Búskapar- og Løgfrøðingafelagnum og starvast á kommunala sáttmálaøkinum, fylgja tí til eina og hvørja tíð galdandi sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Búskapar- og Løgfrøðingafelag Føroya.

16. desember undirskrivaðu vit semju við Maskin-meistarafelagið um at endurnýggja sáttmálan viðvíkjandi maskinmeistarunum, ið starvast hjá SEV og IRF.

Talan er um ein tvey ára sáttmála frá 1. oktober 2015 til 1. oktober 2017, og lønin hækkaði 1. okt. 2015 1,03% og hækka aftur 1,9% 1. okt. 2016. Umframt lønarhækkanirnar, so vóru eisini aðrar ábøtur og dagføringar gjørdar í sáttmálanum.

17. desember skrivaðu vit undir eina 2 ára semju við Starvsmannafelagið at galda frá 1. oktober 2015 til 1. oktober 2017. Lønirnar hækkaðu tann 1. oktober 2015 við 1,71% og hækka aftur 1. oktober 2016 við 1,9%.

Avtalur um m.a. fráboðanarform og fráboðanarfreist, eins og førleikamenning vóru gjørdar, umframt aðrar tillagingar í sáttmálanum.

Í januar og februar mánaði hava vit  undirskrivað sáttmálar við tey flestu av hinum feløgunum, sum hava starvsfólk innan kommunala geiran – Pedagogfelagið, tannlæknarnar, Navigatørfelagið og handverkarafeløgini.

Sáttmáli er eisini gjørdur við heilsurøktarar. Sáttmálin varð avtalaður at galda til 1. oktober, og arbeitt verður við at endurnýggja sáttmálan. Samráðingar hava leingi verið við heilsuhjálpararnar, eitt nú við at gera ymiskar útrokningar út frá verandi hagtølum, og har er komið so mikið ávegis, at sáttmálaparturin kann taka støðu til eitt uppskot innan fáar vikur. Avgerandi er, at samlaði sáttmálin fer at liggja innan fyri sama karm, sum hinir sáttmálarnir.

Viðvíkjandi fysio- og ergoterapeutum og sjúkra-røktarfrøðingum er at siga, at partarnir ikki hava gjørt sáttmálar, men bert avtalu um fylgja sáttmálunum, sum hesir hava við Fíggjarmálaráðið. Vit hava tó gjørt eina serstaka avtalu við tey um, at tá talan er um nýggj størv og flokkingar á kommunala arbeiðsmarknaðinum, verður nærri avtalað við KAF um hetta.

Teir dagrøktarar, sum hoyra heima í Føroya Arbeiðara-felagi, koma helst fyri, so skjótt felag teirra er leyst av sáttmálasamráðingunum vegna teir flestu av sínum limum nú í vár.



# 4

***Flokkingarspurningar***

Flokkingar og umflokkingar av starvsfólkum er ein stórur partur av okkara dagliga virksemi. Vit kunna tí regluliga arbeiðsgevarar um mannagongdirnar í sambandi við nýggjar flokkingar og umflokkingar. Kunningarskriv um flokkingar og umflokkingar varð sent kommunalum- og interkommunalum arbeiðsgevarum 30. desember í 2014.

Vit eiga støðugt at hava í huga, at øll størv, sum ikki frammanundan eru flokkað, mugu flokkast áðrenn tey verða lýst leys alment. Ein møgulig flokking, sum ikki greitt er ásett í einum galdandi sáttmála, má góðkennast av landsstýrismanninum við fíggjarmálum, soleiðis sum § 5, stk. 5 í kommunustýrislógini fyriskrivar.

Mannagongdin í sambandi við flokkingar er vanliga, at arbeiðsgevarar venda sær til okkum við áheitan um at fáa flokkað ávís størv. Hava vit ikki sáttmála við avvarðandi fakfelag, sum starvið ynskist flokkað eftir, so venda vit okkum fyrst til fakfelagið um flokkingina – og síðani til Fíggjarmálaráðið, við áheitan um møguliga góðkenning. Tað er umráðandi, at tað eru vit, sum gera uppskot um flokkingar, og ikki sáttmálaparturin!

*Flokking í sambandi við forskúlar*

Sum øllum kunnugt hevur drúgv ósemja verið um, hvussu lønar- og arbeiðstíðarviðurskifti hjá teimum námsfrøðingum, sum eru farnir at starvast í nýggju forskúlunum, skulu skipast. Henda ósemja hevur ikki verið gagnlig fyri hesa fyrstu royndina at skapa eitt nýtt grundleggjandi læruumhvørvi innan skúlagátt.

Námsfrøðingarnir vístu á, at teir arbeiddu á jøvnum føti við lærararnar, men ikki fyri somu løn. Vit løgdu hin vegin dent á, at talan er um tveir ymiskar sáttmálar. Áðrenn skúlaárið 2015/16 byrjaði, samdust vit tó um, at gera eina avtalu, har bæði byrjunarløn og endaløn verður lyft, eins og tíðin, tað tekur at ganga stigini gjørdist nakað styttri. Eisini verður teirra arbeiðstíð lagað til viðurskiftini í skúlanum, her í millum fyrireiking.

Við hesi avtalu meta vit, at viðurskiftini millum teir báðir starvsbólkarnir, lærarar og námsfrøðingar, eru javnaði og at hetta ikki frameftir fer at gerast ein forðing hjá teimum kommunum, sum hava ætlanir um at fara undir forskúla komandi tíðina.

*SEV og KOB*

Eisini var semja gjørd við Starvsmannafelagið um leiðandi montørar, montørar og eftirlitsfólk, sum við síni servitan er fluttir upp í hægri lønarflokk.

Í semjuni við Starvsmannafelagið varð eisini avtalað, at allir leiðarar, sum eru partur av teirra sáttmála, frásiga sær rættin at leggja arbeiðið niður, og flyta samstundis í hægri lønarflokk.

Handverkarar á KOB eru eisini fluttir upp í hægri lønarflokk (sum vaktleiðarar), soleiðis at teirra løn nú er eitt sindur omanfyri ta hjá arbeiðsmonnunum.



# 5

***Normeringar á dagstovnaøkinum og førleikaviðbøtur***

Nógv hevur verið tosað um normeringar á dagstovnaøkinum seinnu árini. Hóast normeringar er eitt nógv umrøtt hugtak, eru tær hvørki staðfestar við lóg ella sáttmála.

Vit hava tí kannað, hvørja normeringar verða nýttar kring landið, ella hvør útrokningarlykil verður nýttur. Innkomnu tølini vísa, at normeringarnar ikki eru so ymiskar, at tær ikki kunnu grundgevast í ymisku fortreytunum, sum kommunurnar skipa sínar dagstovnar eftir, og sum tað kommunala sjálvræðið leggur upp til. Tølini, sum vit fingu inn, skulu fyrst og fremst nýtast sum samanberingar-grundarlag og annars at útgreina nærri frameftir.

Pedagogfelagið hevur gjørt sítt egna álit um ein normeringslykil. Tey meta, at viðurskiftini eru rættiliga ógreið, og tað er ymiskt frá einari kommunu til aðra, hvussu normeringin er. Eisini koma tey inn á, hvussu støðan var, áðrenn dagstovnaøkið var flutt til kommunurnar.

Pedagogfelagið hevur eisini eitt tilmæli til normeringar á dagstovnunum. Skoytast kann uppí, at munurin ikki er so stórur millum hetta tilmæli og støðuna í nógvum av dagstovnunum.

Spurningur um, hvørt leiðarar á dagstovnunum hava rætt til førleikaviðbót sambært § 22 í sáttmálanum, tá teir hava tikið ymsar eftirútbúgvingar er mangan umrøddur. Her mugu vit vísa til úrskurðin hjá Fasta Gerðarrættinum, har Pedagogfelagið vegna nakrar leiðarar fekk viðhald í sínum

krøvum – hetta hóast vit hava ta fatan, at tað er ein skylda hjá einum leiðara at dagføra sína vitan innan ávísa starvsøkið.

Vit vilja tí minna á, at kommunurnar mugu hava greiðar avtalur við teir leiðarar, sum ynskja at eftirútbúgva seg, um eftirútbúgvingin hevur ein slíkan týdning fyri kommununa, at lønin hjá viðkomandi skal hækkast samsvarandi hesum.



# 6

### *Skeið, evnisdagar og onnur tiltøk í 2015*

Skipað var eisini í fjør fyri ymsum tiltøkum kring landið.

Endamálið var, at gera luttakararnir kunnugar við tær mest týðandi ásetingarnar í ymiskum sáttmálum á kommunala sáttmálaøkinum. Við hesum fekst ein góð mynd av dagligum mannagongdum og fyrisiting av sáttmála-spurningum á kommunala sáttmálaøkinum.

Hetta er sera viðkomandi fyri starvsfólk í starvast í kommununum – og hjá kommunalum/ interkommunalum arbeiðsgevarum, sum í sínum dagliga virki taka sær av sáttmálaspurningum – eins og leiðarum, millumleiðarum, dagstovnaleiðarum o.ø.

Í september mánaði skipaðu vit fyri evnisdegi á Hotel Føroyum, har kunnað varð um, hvussu danir arbeiða við yrkisførleikum, leiðslu, økisleiðslu, fyrireikingartíð og normeringum á dagstovnaøkinum. Í hesum sambandi høvdu vit boðið umboðum úr Gladsaxe kommunu at greiða frá, hvussu fakliga arbeiðið á dagstovnaøkinum hjá teimum er skipað.

Talan var um sera áhugaverdar framløgur, ið vístu, at umfatandi broytingar fara fram á dagstovnaøkinum í Danmark, har okkara okkara egna skipan stavar frá. Spurt kann tí verða, um vit ikki áttu at umhugsa at roynt donsku

broytingar, har tær hóska til okkara viðurskifti – ikki minst við atliti at økisleiðslu. Við hesum fingu vit ein einfaldari og munabetri leiðslubygnað, serliga í teimum kommunum, sum hava fleiri barnagarðar.

Aftaná var orðaskifti og spurningar.



# 7

## *Kunningarferð í Danmark og í Íslandi MAI*

Í mai mánaði varð skipað fyri kunningarferð til Danmarkar, at vitja m.a. Kommunernes Landsforening, KL, og at frætta um samráðingargongdina o.a. á danska arbeiðsmarknaðinum.

KL er ein stórur felagsskapur, sum er mentur í eitt drúgt áramál. KL hevur starvsfólk, sum burturav taka sær av viðurskiftum viðvíkjandi normeringum. Har var hugsanin tann, at einstøku kommunurnar sjálvar duga best at áseta normeringarnar, og tískil eru tær ymiskar frá kommunu til kommunu – og ikki ásettir í lóggávu o.ø.

Normeringar eru ongantíð ein partur av samráðingunum.

Eisini vitjaðu vit hjá Børne- og Ungdomspædagogernes Landsforbund, sum er danska síðustykkið til Pedagogfelagið. Har greiddu teir frá sínum sjónarmiðum um arbeiðsviðurskiftini hjá sínum limum á dagstovnunum.

Ikki er at taka seg aftur í, at donsku kommunurnar hava framt stórar umleggingar av arbeiðsviðurskiftunum á stovnunum, sum fakfelagið er ónøgt við kommunurnar– ikki minst tá talan er um normeringarnar. Hin vegin meta kommunurnar, at viðurskiftini eru so ymisk frá einum dagstovni til ein annan, at tað als ikki ber til at áseta nakran felags normeringslykil. Her má støði takast í avbjóðingunum hjá hvørjum einstøkum stovni.

Eisini í Íslandi fingu vit nærri kunning um normeringar, Áhugavert var at hoyra, at har verða normeringarnar sum so ikki ásettar eftir barnatalinum, men eftir plássi á dagstovninum, úti og inni. Hetta vísir, hvussu stóran dent íslendingar leggja á, at nýta uttandura økið – at tað beinleiðis er partur av, hvussu nógv arbeiðstíð verður játtað til stovnin.

Eisini høvdu íslendingar gjørt sær sínar tankar um eina felags, almenna lønarskipan, sum komið verður inn á niðan fyri. Fyri íslendingar er tað umráðandi, at ein slík skipan byggir á eitt felags støði, sum fyri tey flestu tykist rættvíst – soleiðis at skilja, at øll verða lønt eftir somu einføldu meginreglum, og at feløgini hvørt í sínum lagi ikki hava nakra serstøðu.



# 8

***Felags almenn lønarskipan***

Seinasta tíðina hevur spurningurin um eina felags almenna lønarskipan verið havdur á lofti. Slóðað er fyri slíkum skipanum seinnu árini í hinum norðurlondunum og merkir hetta, at lønarstøðið hjá teimum, ið starvast hjá einum almennum arbeiðsgevara, verður bygt upp eftir einum einføldum, felags leisti. Skipanin er sera greið og sæst aftur við samanberiligum stigum á lønartalvunum.

Við eini felags lønarskipan verða starvsførleikarnir flokkaðir í nakrar bólkar og síðani verður grundlønin ásett eftir hesum. Afturat verða ískoyti latin fyri serliga ábyrgd og innihald í starvinum annars.

Fyrimunurin við hesum er, at øll starvsfólk og feløg teirra verða viðgjørd á sama grundarlagi, og at fólk verða flokkaði í mun til hvørt einstakt starv

Skipanin tykist eisini at skapa størri javnrættindi millum kvinnur og menn, eins og hon gevur fult gjøgnumskygni.

# 9

***Visjónsarbeiðið í KAF***

Til tess at laga virksemi okkara til tær avbjóðingar, sum dagsins samfelag hevur við sær, hevur nevndin og umsitingin sum kunnugt viðgjørt spurningin, hvussu felagið skal leggja kósina komandi árini. Eftir ætlan skulu okkara hugsjónir um framtíðina gerast partur av eini felags visjón, ið Barnaverndarstovan og Kommunufelagið er partur av.

Vit eru komin somikið áleiðis í hesum arbeiði, at vit eru samd um, at vit yvirskipað vilja hava **felags stev**, vit vilja verða **álítandi** og vit vilja **læra og geva vitan**.

Við hesum fylgir, at KAF skal verða ein vælvirkandi partur av KF, vit skulu hava tættari samstarv við KF, eisini við kommunurnar, SEV og IRF. Eisini eiga vit at nýta meira tíð til fyribyrgjandi og ráðgevandi arbeiði. Eisini eigur KAF at verða ein meira opin felagsskapur fyri almenninginum.

Tá vit seta okkum stór mál, verða tey sjáldan rokkin eftir einum degi. Vit hava tí gjørt eina tíðarætlan, har nærri verður útgreinað, hvussu fram verður farið í fyrstu syftu.

Vit raðfesta eitt nú serliga framtíðarætlanir/strategi/mál – skipa fyri skeiðum í starvsfólka- og arbeiðsrætti, kunningardøgum um sáttmálar, arbeiðsmarknaðar-viðurskifti o.a. Í 2015 varð mestur dentur lagdur á:

- Samráðingar um nýggjar sáttmálar
- Normeringar á dagstovnaøkinum
- Fyrireiking av samráðingunum
- Arbeiða víðari við visjónini – strategiini fyri KAF og KF
- Skipa fyri skeiðum í fyri starvsfólka- og arbeiðsrætt
- Evnisdagar – sáttmálar á øllum økjum o.a.
- Avbjóðingar/møguleikar – at vit alla tíðina fáa nýggjar uppgávur, rættarmál o.a., sum vit ikki kunnu stýra.
    - Eldraøkið – meira umsiting, starvsfólkamál - og fleiri fakfeløg, sáttmálar – nýggjar mannagongdir o.a.
    - Fleiri áheitanir, um at gera sáttmálar við fakfeløg á almenna arbeiðsmarknaðinum t.d. BLF og AKF
    - Fyrisitingarligar uppgávur hjá KAF, sum eru fluttar til KF

# 10

***Loðsing***

Tann 1. januar 2013 varð sett í gildi løgtingslóg um havnaloðsing. Sambært lógini um havnaloðsing er tað álagt kommununum serstøk skylda at tryggja, at skip, sum koma til føroyska havn fáa loðs.

Sum partur av semjuni við Starvsmannafelagið og Navigatørfelagið varð avtalað at seta arbeiðsbólk at hyggja eftir, í hvønn mun starvsviðurskiftini hjá havnarmeistarum og - umsjónarfólkum eru broytt í samband við tey krøv, sum kommunurnar eru álagdar sambært lógini um havnaloðsing.

Arbeiðsbólkurin skal í sáttmálaskeiðinum hyggja eftir, hvussu arbeiðið viðv. loðsing verður skipað í dag – og koma við tilmæli um, hvussu loðsing frameftir kann skipast, sum ein partur av starvsinnihaldinum hjá havnarmeistarum- og umsjónarfólkum.

Miðað verður eftir, at arbeiðið skal verða liðugt innan tann 1. oktober 2016.

# 11

***Heimasíða okkara***

Aftaná drúgvar fyrireikingar gjørdist nýggja heimasíðan veruleiki í farna ári.

Hóast heimasíðan sum so er sjálvstøðug, hevur hon tættan felagsskap við tær báðar heimasíðurnar hjá hinum pørtunum í Kommunuhúsinum, Kommunufelagnum og Barnaverndarstovuni. Vit leggja javnan nýtt tilfar á heimasíðuna, sum bæði hevur áhuga fyri kommunurnar og fyri almenningin annars.

Eyðsæð er, at allar heimasíður kunnu gerast betri – eisini okkara. Tað verður tí eisini frameftir roynt at økja um innihaldið, bæði tíðindapartin og at leggja út eldri tilfar, sum kann vísa okkum gongdina á sáttmála- og lønarøkinum.

# 12

***Nýggj skrivstovuhøli***

Sum kunnugt er umsitingin í Kommunuhúsinum flutt í størri og rúmsáttari høli.

Tað var vorðið nakað trongligt í R.C.Effersøesgøtu 30, og tí gjørdi Kommunufelagið av, at útvega sær eini onnur hús í grannalagnum. Talan er um bygningin, har grannskoðarafyritøkan INPACT áður helt til.

Húsini fingu nakrar umvælingar, áðrenn flutt varð inn, eins og tey eru innrættað soleiðis, at hetta skapar frálíkar karmar hjá teimum, sum starvast í umsitingini.

# 13

***At enda***

2015 var eitt hendingaríkt ár.

Vit fingu starvsfólk og sáttmálar á eldraøkinum upp á pláss og samstundis fleiri nýggjar sáttmálar ella avtalur innan hetta fakøki.

Vit hava byrjað arbeiðið við missión, strategi og visjón, sum er liður í at skipa arbeiðið soleiðis, at meira fokus er á endamáli, uppgávunum og við mátanum, sum vit arbeiða uppá.

Vit hava savnað upplýsingar um normeringar á dagstovnaøkinum kring landið og skipað fyri almennum evnisdegi um økið.

Vit hava skipað fyri evnisdøgum kring landið, har KAF hevur arbeitt við at upplýsa um sáttmálar á flest øllum økjum. Skipað verður eisini fyri sáttmáladøgum fyri eldraøkið í 2016.

Vit ætla, at KAF eisini í 2016 skal varpa ljós á stór mál, so sum samráðingar, visjónsarbeiði, eina felags almenna lønarskipan, sálarliga arbeiðsumhvørvið hjá starvsfólkum okkara, førleikamenning og mangt annað.

Eg skal at enda nýta høvið at takka nevndini og starvsfólkunum fyri væl útint arbeiði og fyri góða samstarvið í farna ári.

Takk fyri.

Tórshavn á Summarmála 2016

Heðin Mortensen
Formaður